

Súrepli

Ein frukt var bannað Evu at eta, móti tí forboð hon vildi seg seta.
Mangan akta vit ikki Guds boð. Hví heldur tú, tað man vera so?



Hjørtu

Tey mongu hjørtu, sum lýsa reyð, minna um Jesus og hansara deyð.
Menniskjum mugu vit kærleika vísa, Jesus hevur sagt, at vit skulu lýsa.



Kurvar

Smáfiskar tveir og fimm smá breyð loystu fólkið úr hungursneyð!
Jesus gav føði til likams og anda, loysa hann kann úr hvørjum vanda.



Fløgg

Eitt krossmerkt flagg, hvat sigur tað tær?
“At trúgvin í Føroyum víst boðað varð.“
Jesus er Harri, hetta boð okkum ber, mong vita av tí og tíðin hon fer.



Træið

Várt jólatræ skal minna teg á, at Jesusbarnið í krubbu lá.
at Jesus nevndi seg sjálvan eitt træ, og vit eru greinarnar, minnist til tað.



Træið

Jólatræið, so vakurt og hátt, minnir um vøkstur og lívið gott, minnir um træið í paradís, har vit skulu bera Harranum prís.



Træið

Várt jólatræ skal minna teg á, at Jesusbarnið í krubbu lá,
um alt hann gjørdi, og alt hann lærdi,
og ikki lív sítt á foldum spardi.